# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt stig nærri sjálvræði

Tað ser synd at siga, at semjan í donsk-grønlendsku sjálvstýrisnevndini um ráevni í undirgrundini, sum varð kunngjørd í gjár, hevur vakt ans í Danmark. Bert eitt blað, Jyllandsposten, hevur umrøtt avtaluna, og DR 2 hevur havt viðmerking frá serfrøðingi, ið metti, at grønlendingar hava fingið alt og danir lítið og einki. Sum kunnugt gevur avtalan Grønlandi ræði á ráevnum í undirgrundini, eins og avtalan ásetur, hvussu vinningurin skal nýtast. Hann fer í høvuðsheitunum til at avvikla blokkin. Semjan er tí eitt stig nærri meira grønlendskum sjálvræði.

Grønlendsku flokkarnir eru vælnøgdir, men í Danmark er danski fólkaflokkurin hart ímóti, tí flokkurin heldur Grønland fáa í posa og í sekk. Sami flokkur hevur boðað frá, at hann heldur, at grønlendska tjóðin eigur einki í landnyrðingspartinum av Grønlandi, har hildið verður, at nógv ríkidømi er í undirgrundini. Flokkurin byggir støðu sína á hetta, at verandi inuit í Grønlandi ongantíð hevur bygt landnyrðingsgrønland, og tí eigur Danmark hendan partin av grønlendsku oynni. Grundgevingin er, at danir við síni hernaðarligu hjáveru hava vunnið sær rættin til økið. Konservativi flokkurin í Danmark heldur hesi sjónarmið vera so áhugaverd, at flokkurin krevur løgfrøðiligar og søguligar kanningar til tess at eftirkanna, um nakað er um alt hetta. Hetta fær okkum at minnast púra órímuligu krøvini Bretland setti okkum í marknatrætuni, m.a. tí vit vóru so fá. Har hildu vit fast, og Stórabretland mátti boyggja seg. Sama eiga okkara grønlendsku grannar fyri norðan at gera. Standa fast við sítt land og síni rættindi.

Nógv innan ríkisfelagsskapin sum uttanfyri hendan felagsskap undrast á hesa støðu og spyrja, um hetta í roynd og veru ikki er gamalt hjálanda hugagóðs, sum her flotnar upp. Tað er tó eingin vandi fyri avtaluni ella sjálvstýrismálinum, tí stórur meiriluti er fólkatingi so væl sum í landstinginum fyri semjuni. Semjan er knýtt at sjálvstýrisuppskotinum, sum fer til fólkaatkvøðu í Grønlandi til heystar. Semjan og sjálvstýrisuppskotið geva onga ábending av politisku lagnuni í eini framtíð, sum liggur longur úti enn sjálvt sjálvstýrisuppskotið og undirgrundarsemjan. Tað er tó lítið at ivast í, at verða sjálvstýrisskipanin og undirgrundarsemjan til gagns fyri grønlendska búskapin, tjóðina og fyri politisku skipanina sum heild, so fer Grønland at flyta seg móti loysing frá Danmark.

**Sosialurin**

## Sáið nú ikki bara mistreysti



**JÓANNES EIDESGAARD**
løgmaður

**Fjáltur er komin á leiðslurnar í stóru bankunum og politikarar úr serliga Sambandsflokkinum. Onkur vil verða við, at tað verður ein vanlukka, um føroyingar sjálvir taka ábyrgd av fíggjareftirlitinum. Men tað er als ikki nøkur orsøk til henda fjáltur og at sáa hetta mistreystið. Tí vit fara ikki at taka nøkur óráð, sum kunnu skaða bankarnar ella okkum sjálvi**

Allir flokkar hava lagt stóran dent á týdningin av, at vit gerast partur av altjóðageròini. Somuleiðis staðfesta vit við gleði, at fíggjarstovnarnir nú reka eitt alsamt størri virksemi uttan fyri landoddarnar. Hetta er eisini ein avgjørd fyritreyt fyri, at vit framhaldandi kunnu hava ein vøkstur í samfelagnum. Ein avbyrging førir til undirgang, ein upplating er vegurin fram.

**Tey fýra frælsini**

Samgongan hevur sett sær sum mál at yvirtaka fíggjarøkið, fíggjareftirlitið og fíggjarrættin. Henda yvirtøka vil geva okkum munandi betur altjóða virkisføri og er ein íløga í eina altjóðagjørda framtíð. Yvirtøkan vil geva okkum atgongd til tað eina av teimum fýra nógv umrøddu frælsunum, nevniliga frían flutning av kapitali. Tað er ein skilagóð yvirtøka, sum vil stilla okkum betur í okkara samráðingum um ein EFTA-limaskap og við at fáa avtalu um tey fýra frælsini við ES. Hetta er ikki ein yvirtøka bara fyri at yvirtaka. Hendan yvirtøkan gevur meining.

**Yvirtøka av fíggjareftirlitinum**

Hvat merkir so ein yvirtøka av fíggjareftirlitinum í praksis? Hon merkir, at vit taka politiska og umsitingarliga ábyrgd av málinum. Løgtingið fær lóggávuheimildirnar og ikki Fólkatingið, og landsstýrið fyrisitingarligu ábyrgdina og ikki ein donsk ráðharrastova. Lóggávuvald á fíggjarøkinum, sum vit kenna tað longu nú, er alt stórt sæð regulerað í ES-lóggávu. So tað snýr seg meira um at seta í gildi lóggávu, heldur enn at vit sjálvi smíða hesar lógir. Men munurin verður, at allar heimildir liggja hjá okkum og ikki í Fólkatinginum. Stóri fyrimunurin liggur í, at vit tá fáa ræði á tí eina frælsinum í okkara altjóða virksemi og vit sjálvi kunnu gera avtalur innan økið.

**Fíggjareftirlit eftir føroyskum leisti**

Tá ið tað kemur til tann praktiska partin, so kann hesin loysast á ymiskan hátt. Málið er, uttan mun til, hvør loysn verður vald, at fíggjareftirlitið skal hava eitt altjóðastøði, sum ger, at virðingin verður tann sama, sum hon er í dag. Kredittvirði føroyinga, sum Moody´s hevur givið sera gott ummæli, skal ikki versna av hesum yvirtøkum.

Talan verður ikki um, at vit skulu seta á stovn eitt fíggjareftirlit við kanska hálvthundrað serfrøðingum, sum onkur hevur róð framundir. Vit taka ábyrgdina, men fara ivaleyst at gera eina avtalu við eitt eftirlit, sum kann átaka sær hesa uppgávuna okkara vegna. Sannlíkt er, at endin verður, at vit gera eina avtalu við danska fíggjareftirlitið um, at tey røkja hesa uppgávu framyvir okkara vegna og fyri eitt gjald, sum tað almenna má gjalda.

Tískil er heldur eingin vandi fyri, at bankarnir skulu gjalda hægri rentu fyri lántøkur úr útlondum av hesi orsøk. So fyri umdømi og onnur viðurskifti fer neyvan tann stóri munurin at merkjast.

**Trygdin hjá innsetarunum**

Tá ið talan er um trygdargrunnin ella "indskydergar antifonden", sum tryggjar øllum, ið hava innistandandi í einum banka við upp til 300.000 kr., so er tað givið, at henda skipan fer at halda fram. Føroyskir peningastovnar verða partur av donsku trygdarskipanini fyri eitt ávíst gjald, sum teir longu nú gjalda. Hetta er ein samhaldsføst avtala millum bankar, og hví skulu vit ikki kunna halda fram í hesari, sjálvt um málsøkið verður føroyskt?

Eg haldi ikki, at tað gagnar okkara kredittvirði sum tjóð, at vit í kór siga, at vit einki kunnu sjálvi, og at alt fer í sor, um vit sjálvi taka ábyrgd. Vit mugu signalera sjálvsálit og ikki sáa mistreystið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.